# At garva skinn

**Dagur 1:**

Legg skinnið við roðsíðuni uppeftir, salta ordiliga væl við grovum salti uttan jod (t.d. Ibizasalt), ongin berur blett má vera - ullin dettur av, har einki salt er. Gott er, um skinnið kann liggja á einum platti, soleiðis at væta kann renna frá.

**Dagur 2:**

Rist gamla saltið av, koyr nýtt salt á og lat síðan liggja í minsta lagi 7 samdøgur. Tá tú hevur skift saltið út, kann tað gott liggja í fleiri mánaðir.

**Dagur 8:**

Vaska skinnið væl í lunkaðum/køldum sápuvatni, her kann man nýta milda kropp- og hársápu (t.d.Kemilux kropp- og hársjampo). Um man velur at nýta sápuspønir, mugu tær vera ordiliga upploystar. Skift sápuvatnið minst 4-5 ferðir, tað veldst um, hvussu skiti skinnið er.

Tá man sær hondina 4 - 5 cm undir vatnskorpuni, er nóg væl vaskað.

Lat skinnið kølna, áðrenn skolað/spulað verður við køldum vatni, annars kann ullin tøvast.

Skola/spula skinnið væl.

Hong tað um ein bukk e.l. soleiðis, at so nógv vatn sum gjørligt kann renna frá. Til ber eisini at koyra skinnið í eina sentrifugu um hendan er til taks.

Nú skal roðsíðan reinsast fyri feitt og skitt. Eitt amboð, ið hóskar sera væl til hetta arbeiði, er ein ulo (grønlendskur kvinnuknívur). Um tú ikki hevur eina ulo, kann ein vanligur knívur brúkast.

Um hetta arbeiðið ikki verður liðugt sama dag, kanst tú salta skinnið aftur, leggja tað saman og halda áfram næsta dag. Betur tað verður reinsað her, lættari gerst arbeiðið seinni.

Turka roðsíðuna við køkspappíri ella líknandi.

Smyr alúnbland á. Um tú smyr við hond, nýt tá handskar, tí at alún kann órógva húðina.

***Alúnbland til eitt skinn:***

3 eggjarreyðar
3 dl olju
¾ dl alún
2 dl kókandi heitt vatn
2-3 dl kalt vatn
300 g mjøl

Píska eggjareyðar og olju saman, koyr umleið 150 g av mjøli í, til tað hevur mettað oljuna.

Loys alún uppí tað heita vatnið, koyr síðan tað kalda vatnið í alúnblandið. Hendan blandingin skal helst ikki vera ov heit, tá hon verður latin í eggjablandið - um alúnblandið er ov heitt, kóka eggjareyðarnir og tað skal ikki henda.

Koyr síðan alúnblandið so við og við í eggjablandið, meðan pískað verður.

Koyr síðan restina av mjølinum í, til tað er sum eitt sindur tjúkt pannukøkudeiggj.

Tá alúnblandið er smurt á roðsíðuna, skal tað liggja, til skorpa er komin á alúnblandið. Um skinnið liggur í einum rúmi við stovuhita, kann hetta taka eitt samdøgur, longri tíð um tað er kaldari. Tó má tað ikki vera ov kalt, tí so kann rot koma í.

**Dagur 10:**

Skava alúnblandið av. Ansa eftir at tað ikki kemur í ullina - hetta er ringt at vaska úr aftur ullini.

Vaska síðani skinnið aftur í lunkaðum sápuvatni - hesuferð við tí sápuanga einum ynskir.

Skift vatn um neyðugt. Um man vil, er væl gjørligt at koyra hundabalsam í (t.d. Iv San Bernard), hetta kann lætta um, tá ullin seinni skal greiðast. Skola/spula sápuna úr aftur, tá skinnið er kølnað og lat dryppa væl av. Turka roðsíðuna við køkspappír ella líknandi. So skal ein mýkingarblanding smyrjast á.

***Mýkingarbland til eitt skinn:***

1 eggjareyða
½ dl olju
100 g mjøl
3 dl flótt vatn (umleið 30 stig)

Píska eggjareyða og olju, koyr mjølið í. Koyr síðani vatnið í so við og við, til tað er sum tunt pannukøkudeiggj.

Legg skinnið við roðsíðuni uppeftir, smyr blandið væl á, eitt tunt lag. Tryggja tær, at tað kemur væl niður í roðina.

Hong skinnið um ein bukk, legg á ein platt ella eina rist at torna (t.d. í fýrrúmi), hetta kann gott taka nakrar dagar. Tó má rúmið ikki vera ov kalt, tí so kann rot koma í.

**Dagur 11 +:** (um skinnið er turt)

Um nakað er eftir av mýkingarblandinum á roðsíðuni, skal tað skavast av. Hygg til tað javnan. Flyt uppá tað, toga í tað, strekk tað.

Tá tað byrjar at torna, men enn er ráligt, byrja so at pussa við sandpappíri við kornstødd 120, síðani við kornstødd 220, tá tað er turt.

## At garva skinn

Skinnið **MÁ** mýkjast ímeðan tað tornar. Hetta kann gerast við at toga í við báðum hondum um ein rundan borðkant, tvørturum ein bukk, rullast eftir lærinum - tað sum fellur einum lættast.

Fyri at leingja um mýkingartíðina, kann ein leggja ein vælvundnan vátan lappa á roðsíðuna, har tað er blivi turt.

**Tá skinnið er liðugt mýkt og pussað:**

Busta/greið skinnið væl - antin við hundabust ella karðum. Sker skinnið til frá roðsíðuni við einum sera hvøssum knívi.

Nelly Haakonardóttir Debes og Guðrið Holm
Kvívík
Oktobur 2018

## At garva skinn



Dagur 8: Vaska skinnið og reinsa roðsíðuna



Ein ulo er eitt vælegnað amboð til hetta arbeiðið

## At garva skinn





Alúnbland smurt á roðsíðuna



Dagur 10: Skava alúnblandið av

# At garva skinn



Dagur 10: Vaska og lat dryppa av. Hugskot til at busta/greiða við (Labbin.dk)



Dagur 11: Byrja at greiða skinnið

## At garva skinn




3-lit lambsskinn, vaska við Navia-ullvask, 2-litt lambsskinn, vaska við Iv San Bernhard Caviar shampoo